– trygt og ómakaleyst til hús



# Serlig hús í Hoyvík

**Alt er gjørt á besta hátt – bæði innan og uttan. Húsini eru sera snøgg og nakað heilt serligt**









### Fyrsta fatanin

Fyrsta fatanin er, at í hesi gøtuni standa eini hús, sum eru heilt serlig. Húsini standa sera væl fyri við blindan veg.

### Húsini

Húsini eru 5 ára gomul. Tey eru í 3 hæddum, og eru sera spennandi. Frá køkinum sleppur tú beinleiðis út í hjallin. Frá stovuni er útgongd til stóra altan /terassu, og frá kamarinum er útgongd til eina aðra altan, so tú kanst njóta sólina til langt út á kvøldið. Húsini eru stoypt upp og klødd við timbri. Tað er gjørt klárt at byggja bilhús omanfyri húsini.

Húsini standa sera væl og frítt fyri. Tey standa í náttúruvøkrum, friðarligum, veðurgóðum og barnavinaligum umhvørvi við blindan veg og gøtum millum býlingarnar. Dagstovnar, býlingshús, skúlar, sparkivøllur og busssamband eru nær við.

### Stílur og snið – inni og úti

Stílurin er nútímans lættur og ljósur, ein samansjóðing av romantiskum og ráðum. Opni stílurin innan ger, at tú hevur gott samband við umhvørvið uttan, men hóast tað, er tað sera fjálgt inni hjá tær sjálvum. Grundstykkið er stórt, so tað liggur væl fyri at gera garð/urtagarð.

### Innrætting

Í miðhæddini er inngongd, hall / garderoba, uppgongd til ovastu hædd, trappugongd til niðastu hædd, baðirúm, bryggers / vaskirúm, kamar við útgongd til útigólv, kovi, matarkøkur / alrúm við útgongd til hjall og útigólv, borðstova / stova við útgongd til útigólv. Í ovastu hædd er trappupallur / alrúm / stova, hjúnarrúm, baðirúm og 3 kømur. Í niðastu hædd eru 2 inngongdir, goymslurúm og stórt óinnrættað kjallararúm.

### Fakta:

Adressa.....Hákunargøta 22, Hoyvík
Býggiár.................................... 2004
Hæddir ............................................3
Gólvvídd............................... 340 m2
Grundøki...............................619 m2
Hjallur..............................................Ja









PF inni
Niels Finsensgøta 37

Postboks 364
FO-110 Tórshavn

Telefon 35 42 00
inni@inni.fo

Sí fleiri hús á **inni.fo**